# Útboð – nýggj heilsuskipan til Heilsuverkið í Føroyum

Føroyska heilsuverkið fer undir at verkseta eina nýggja talgilda heilsuloysn, sum skal styrkja samstarvið tvørtur um Sjúkrahúsverkið, Apoteksverkið, Kommunulæknar, Gigni og Kommunalar Heilsutænastur. Endamálið er at skapa eina nútímans, samanhangandi og borgaravenda heilsutænastu við høgari góðsku.

Nýggja loysnin verður ein felags journal og eitt felags talgilt grundarlag, ið ger tað lættari hjá heilsustarvsfólki at samstarva, og at tryggja, at dátur kunnu deilast trygt og álítandi. Loysnin skal millum annað stuðla undir vaksandi tørvin á talgildan, sum skal tvinnast saman við at borgarin verður eldri við fleiri kroniskum sjúkum, har tað er alneyðugt at viðgerð, røkt fyribyrging er samanhangandi tvørtur um geirar.

Heilsuverkið leitar eftir einum høvuðsveitara til keyp, verksetan, rakstur og viðlíkahald av loysnini, og ynskir eitt langtíðar strategiskt samstarv, har partarnir í felag menna og reka Loysnina.

Útskiftingin av verandi skipan er byrjanin til eina framhaldandi talgilding av heilsuverkinum, sum skal tryggja eina meira effektiva, tryggja og samanhangandi viðger, røkt og fyribyrging - við borgaranum í miðdeplinum.

Visjónin fyri nýggju loysnina, er:

> […] ein framtíðartryggjað loysn fyri alt heilsuverkið, sum setur borgaran í miðdepilin. Loysnin er ein felags journal, sum styrkir tvørgangandi samstarvið. Málið er at stuðla undir heilsu og at lætta um gerandisdagin hjá heilsustarvsfólkum.

Fleiri upplýsingar fáast í útboðstilfarinum, sum er lagt út á keypsportalin tann 4. februar 2026.

SJÚKRAHÚS VERKIÐ heilsutrygd

Kommunufelagið

GIGNI Heilsufrøði til børn & ung apoteksverkið NATIONAL PHARMACY SERVICE

GJALDSTOVAN